# Fiskapakki fyri tingið til várs

**Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, væntar, at eitt uppskot um sonevnda fiskapakkan verður liðugt viðgjørt og lagt fyri tingið, áðrenn komið verður langt út á várið**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*

*vilmund@sosialurin.fo*



*Teir stinga høvdini saman um fiskapakkan, Bjørn Kalsø og Herálvur Joensen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Landsstýrið hevur nú tveir sonevndar fiskapakkar at taka støðu til – sín egna og tann alternativa hjá vinnuni.

Á fundi á Hotel Føroyum fyrr í heyst legði Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, fram høvuðspunktini í einum fiskapakka, sum landsstýrið hevði gjørt. Á hesum fundi harmaðist landsstýrismaðurin um, at vinnan ikki var komin til eina semju um gongdar leiðir og tískil í størri mun kundi verða við til at seta ein nýggjan fiskamarknaðarpolitikk út í kortið.

Men uppundir ársenda var semjan, sum landsstýrismaðurin hevði eftirlýst, komin so langt, at Fiskimálaráðið kundi kalla til tíðindafundar.

Umframt landsstýrismannin, sum var vertur á fundinum, vóru umboð fyri Ráfiskakeyparafelagið, Ráfiskaseljarafelagið og umboð fyri Føroya Fiskimannafelag við á hesum fundi, har ein undirskrivað semja frá hesum trimum feløgunum varð handað landsstýrismanninum.

Hetta var við øðrum orðum ein alternativur fiskapakki til fiskapakkan hjá landsstýrismanninum.

### Ikki full semja

Meðan ráfiskakeypararnir stóðu sum ein maður um hesa semju, var ikki full semja um fiskapakkan millum limirnar í ráfiskaseljarafelagnum. Felagið Línuskip og Meginfelag Útróðrarmanna tóku nevniliga ikki undir við øllum pørtum í tilmælinum.

Bjørn Kalsø sigur, at formaðurin í ráfiskaseljarafelagnum, Árni Joensen, hevði kunnað hann um, at full semja ikki var í felagnum um tilmælið, og tí kom tað ikki óvart á hann, tá ið felagið Línuskip og Meginfelag Útróðrarmanna gjørdu vart við sína støðu eftir, at tilmælið var handað og almannakunngjørt.

### Uppskot til várs

– Ætlanin var, at landsstýrið skuldi vera komið longri við viðgerðini av hesum máli fyri jól, men tað eydnaðist ikki. Nú hyggur umsitingin at málinum, og eg vænti, at komið verður ikki langt út á várið, áðrenn eitt uppskot verður lagt fyri tingið.

Bjørn Kalsø vil tó ikki siga, um grundarlagið undir uppskotinum verður pakkin hjá landsstýrinum – ella tilmælið, sum feløgini í vinnuni hava latið landsstýrismanninum.

– Tað er ein misskiljing, tá ið sagt verður, at landsstýrið ætlar at lóggeva fisk upp á land til virkingar í Føroyum. Tað, sum landsstýrið í fyrsta lagi vil við uppskotinum, er at skapa eina meira javnbjóðis kapping um fiskin í Føroyum, soleiðis at hann verður atkomiligur bæði hjá føroyskum og útlendskum keyparum, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum.

# Javnari tilgongd, betri góðska og bestu fiskaprísir

VINNUTILMÆLIÐ

*Vilmund Jacobsen*

*vilmund@sosialurin.fo*

Tilmælið, sum Føroya Ráfiskaseljarafelag, Føroya Fiskimannafelag og Føroya Ráfiskakeyparafelag lótu landsstýrismanninum, Bjørn Kalsø, í desember, er í 12 punktum. Haraftrat eru fimm punkt, sum feløgini halda, at myndugleikar og vinna miðvíst eiga at arbeiða við til tess at menna kappingarførið í høvuðsvinnuni.

Í stuttum er tilmælið hjá vinnuni hetta:

1) Proformasølurnar skulu steðgast.

2) Allur fiskur, sum verður útfluttur óvirkaður úr Føroyum, skal av loyvishavaranum (skipinum) bjóðast út um føroyska góðkenda uppboðssølu. Loyvt verður føroyingum og útlendingum at bjóða upp á fiskin.

3) Støddarflokking – umborð ella í landi – av í minsta lagi 50% av toski, hýsu, longu, brosmu, kongafiski, svartkalva og




*Nýggjar reglur eiga at gerast fyri uppgerð av fiskidøgum, sum eggja skipunum at gera styttri túrar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

havtasku, bæði tá ið fiskurin fer til virkingar í Føroyum ella verður útfluttur óvirkaður. Royndartíðin byrjar 1. mars 2005 og varar í eitt ár.

4) Eftir royndartíðina verður mett um, hvørt støddarflokkingin hevur rokkið sínum endamáli – at fáa meira fisk til virkingar í Føroyum og at fáa ein hægri prís ella vinning.

5) Serstøður við eitt nú upsa, har einki veruligt boð kemur, kunnu loyva beinleiðis landing uttanlands ella flutning beinleiðis úr Føroyum – uttan at ávirka loyvda hámarkið fyri landingum uttanlands.

6) Loyvt verður at landa uttanlands, tá ið virkini ikki kunnu keypa vegna frítíð og verkføll. Hetta ávirkar ikki hámarkið fyri landingum uttanlands.

7) Fyri at tryggja virkjunum javna tilgongd, bestu góðsku og skipunum besta prís, verða upplýsingar um øll viðkomandi veiðitøl samskipað av góðkendari uppboðssølu, sum sendir upplýsingarnar til allar áhugaðar fiskakeyparar.

8) Nýggjar reglur fyri uppgerð av fiskidøgum, sum eggja skipunum at gera styttri túrar.

9) Veiðifør, sum ikki eru partur av fiskidagaskipanini, koma undir allar ásetingar, tó við nøkrum undantøkum.

10) Skip, sum eru í beinleiðis veiði eftir fiskasløgum, sum stinglaksi, langasporli, hávi, kikarafiski við meira, og sum fiskakeyparar ikki eru til í Føroyum, verða undantikin ásetingunum, tá ið nevndu fiskasløg eru meira enn 50% av veiðini. Arbeitt verður við at menna virkingina á landi av hesum fiskasløgum.

11) Parturin, sum kann landast beinleiðis uttanlands, verður 25% fyri hvørt triðingsár, Mótrokningin fyri landingar omanfyri hetta, verður sum nú við fiskidøgum fyri tey skip, sum eru í fiskidagaskipanini. Skip, sum ikki eru í fiskidagaskipanini, rinda eitt avgjald svarandi til í mesta lagi 30% av søluvirðinum av tí nøgd, ið avreidd er ov nógv uttanlands í útrokningartíðarskeiðinum.

12) Ein nevnd metir um skipanina og skal vísa á trupulleikar og koma við uppskotum til loysnir.

Myndugleikar og vinna eiga miðvíst at arbeiða við at menna kappingarførið í høvuðsvinnuni við at: 1) Menna logistikkin úr Føroyum til marknaðin, 2) Menna logistikkin innanlendis í Føroyum, 3) Stuðla felags sølu og marknaðarføringstiltøkum til frama fyri alla vinnuna, 4) Stuðla undir framleiðslu av alternativum fiskasløgum, so øll rávøran verður gagnnýtt á bestan hátt og 5) Stuðla vinnugransking innan veiði-, reiðskaps-og framleiðslutøkni.